UTTAN ÚR HEIMI

# Í túsundatali doyggja og heilsuverkið er í sori



*Sunnudagurin var ein av teimum heilt ófriðarligu døgunum í Irak. Í býnunum Kerbala og Najaf doyðu 62 fólk av bilbumbum*

*Mynd: Reuters*

**Kríggið og ófriðurin í Irak hava kostað fleiri tíggjutúsund irakum lívið. Tey flestu eru kvinnur og børn**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað vakti stóran ans, tá tað viðurkenda bretska læknatíðarritið Lancet kunngjørdi í oktober, at umleið 100.000 sivilfólk hava latið lív í Irak, síðani kríggið har byrjaði í mars í fjør. Amerikanska stjórnin fanst hvassliga at metingini, og Lancet viðgekk seinni, at ivi var um talið. Serfrøðingarnir á lærda háskúlanum John Hopkins í Baltimore í USA, sum høvdu gjørt kanningina, hildu tó fast um, at talið var á góðari leið.

Nú hevur bretski stovnurin Medact kunngjørt eina nýggja kanning, sum kemur til ta niðurstøðu, at metingin í Lancet var ikki heilt av leið. Stovnurin sigur, at alt fleiri og fleiri sivilfólk lata lív í ófriðinum í Irak, og at uppaftur nógv fleiri fáa varandi mein, tí heilsuverkið virkar als ikki.

Sambært Medact er støðan so álvarssom, at heilsustøðan hjá irakska fólkinum er í vanda, sum tikið verður til í frágreiðingini.

Eins og Lancet vísir Medact á, at undan kríggnum doyðu flestu irakar av hjartasjúkum ella ymsum varandi sjúkum, men síðani kríggið byrjaði, eru nógv tey flestu deyð av krígsatgerðum ella harðskapi. Lagt verður afturat, at tey flestu, sum doyggja av hesum ávum, eru kvinnur og børn.

Vanliga hevur ST ábyrgdina av at veita fólki í krígsøkjum hjálp, men Medact sigur, at ófriðurin hevur gjørt tað ómøguligt hjá ST og øðrum altjóða felagsskapum at veita irakska sivilfólkinum ta neyðugu hjálpina. Amerikonsk hjálpartiltøk hava heldur ikki virkað, sigur Medact, sum mælir ST til at seta eina óhefta nevnd at kanna, hvussu stóran skaða kríggið hevur gjørt irakska fólkinum, og hvussu heilsustøðan í landinum veruliga er.

# Skrivaði ikki undir samkenslubrøvini

**Nógvir amerikanskir politikarar eru misnøgdir við, at Donald Rumafeld, verjumálaráðharri, letur eina maskinu skriva undir samkenslubrøvini til teirra, sum hava mist hermenn í Irak**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani kríggið í Irak byrjaði, hava meiri enn eitt túsund húski í USA fingið bræv frá verjumálaráðnum, tí tey hava mist onkran í krígnum. Tey avvarandi hava hildið, at Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, hevur skrivað undir brøvini, tí undirskrivt hansara stendur niðast á brævinum, men nú vísir tað seg, at ráðharrin hevur latið eina maskinu skriva undir fyri seg, skrivar Reuters.

Tað hevur fingið øði í nógvar politikarar, eisini floksfelagar hjá ráðharranum.

- Eg havi ilt við at trúgva hasum, men hatta vísir bara, hvussu líkasælir teir eru. Eg havi ikki álit á Rumsfeld longur, segði republikanski senatorurin Chuck Hagel við sjónvarpið CBS um vikuskiftið.

Rumsfeld viðgekk sunnudagin, at hann hevði ikki skrivað undir brøvini, sjálvt um tað sær soleiðis út.

## Letur fangar leysar

Ísraelsku myndugleikarnir hava gjørt av at lata 170 palestinskar fangar leysar sum samsýning fyri, at Egyptaland lat ein ísraelskan njósnara leysan herfyri. Avgerðin er eisini ætlað sum ein roynd at sissa palestinar upp undir forsetavalið, sum verður í teimum palestinsku økjunum í næsta mánað.

Talsmaðurin hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra segði um vikuskiftið, at teir 170 fangarnir sleppa úr fongslinum fyrsta dagin. Hann dugdi ikki at siga, hví palestinararnir sita í fongsli, men vísti á, at ísraelska stjórnin fyrr hevur sagt, at fangar, sum hava blóðugar hendur, sleppa ikki út.

Vanliga uppfatanin er, at hetta merkir, at fangar, sum hava skipað fyri ella framt álop á ísraelsk mál, fáa ikki grið.

## Lula missir stuðul

Tann fyrr so væl umtókti brasilski forsetin, Luiz Inacio Lula da Silva, hevur nú sitið við valdið í tvey ár, men nú er grundarlagið undir stjórn hansara farið at rilla.

Bæði á høgravonginum og á vinstravonginum finnast politkarar at forsetanum, sum verður lagdur undir dugnaloysi. Tveir av stjórnarflokkunum hava nú kunngjørt, at teir hava tikið seg burtur úr samgonguni, og teir hava samstundis boðað frá, at teir fara at stilla egin valevni upp til forsetavalið í 2006.

Tey misnøgdu leggja Lula undir at hugsa ov nógv um búskapin og alt ov lítið um støðuna hjá teimum fátæku í Brsil. Forsetin sigur, at stjórnin var noydd at leggja dent á búskapin, men at hon nú fer at leggja størri dent á almannamál og skúlamál.

Útlendskir eygleiðarar hava hug at verja forsetan. Teir siga, at hann hevur fingið skil á búskapinum, og at tiltøkini hjá stjórnini hava givið stóran búskaparvøkstur.

## Í øðini um sjónleik

Sikhar í Bretlandi eru í øðini um ein sjónleik, sum verður spældur í einum leikhúsi í Birmingham, og um vikuskiftið gingu fleiri hundrað fólk mótmælisgongu uttan fyri leikhúsið.

Sjónleikurin er ætlaður at lýsa viðurskiftini hjá sikhiskum kvinnum, og í leikinum kemur millum annað fram, at tær verða javnan neyðtiknar og illa viðfarnar. Tað er ikki júst tað, sum hevur fingið øði í teir bretsku sikharnar, men heldur tað, at leikurin fer fram í einum templi. Tað halda sikharnir vera niðursetandi og ærumeiðandi.

Politikarar í Birmingham eru yvirhøvur samdir við sikhunum, men í leikhúsinum siga tey, at tey hava longu broytt leikin fyri ikki at elva til øsing. Ikki nóg mikið, siga teir sikhisku leiðararnir. Leikhúsið vísir á lógina, sum tryggjar talifrælsi, og sýtir fyri at gera fleiri broytingar.

## Eingin royking

Í Teilandi og øðrum buddhistiskum londum er tað siður, at fólk geva munkunum pengar og mat, og tað hendir eisini meiri enn so, at munkarnir fáa sigarettir frá fólki.

Men nú hevur tann buddhistiska leiðslan í Teilandi skotið upp, at munkarnir skulu ikki fáa sigarettir. Í Teilandi eins og aðrastaðni eru heilsuávaringar uttan á sigarettpakkunum, men eftir nýggja uppskotinum skulu myndugleikarnir eisini ávara fólk ímóti at geva munkunum sigarettir. Ætlanin er, at fólk skulu fáa at vita, at tað er synd at geva munkum sigarettir.

Í sambandi við uppskotið umhugsa myndugleikarnir at banna munkunum at roykja inni í templunum. Afturfyri er stjórnin til reiðar at bjóða teimum munkunum, sum roykja, ókeypis skeið, sum skal fáa teir at leggja av. Tað er ikki greitt, hvat munkarnir sjálvir siga.